## Nýtt úr Funningsfirði

**Mikudagin er Oyggjablaðið á tremur við tíðindum og reportasjum úr Funningsfirði. Lesið í hesum blaðnum millum annað:**


**Gestur vil gera ein transformara**


**Framleiða 300 plattar um tíman**


**Malvinus (79) hevur úr at gera**


**Rebekka skrivar, teknar og skjýtur ørvar**


**HVØR KEMUR FYRST?**

*Tunlarnir í Norðoyggjum eru vandamiklir, og tí er neyðugt at okkurt verður gjørt fyri at betra um ferðslutrygdina. Tí hevur tingmaðurin, Heini O. Heinesen spurt um, hvør tunnil skal gerast fyrst – tann til Árnafjarðar ella tann til Viðareiðis*

# Ynskir greið boð um tunlar

**- Tað hevur skund at gera okkurt við ferðslutrygdina í Norðoyggjum, sigur tingmaðurin Heini O. Heinesen úr tjóðveldi. Hann vil hava Anniku Olsen at svara uppá, um tunnilin til Árnafjarðar ella tann til Viðareiðis skal gerast fyrst.**

Snorri Brend

– Okkurt má gerast longu í hesum árinum, sigur tingmaðurin, og vísir til stóra arbeiðsloysið í Norðoyggjum innan jørð- og betongarbeiði.

Hann hevur spurt Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum um tunnilsætlanir í økinum.

Ein tunnil Norður um Fjall – ella Eystur um Fjall, sum Heini tekur til – er longu prosjekteraður og samtyktur.

Men sambært honum er tað løgna hent, at í ár eingin króna játtað til hetta endamálið.

– Ístaðin eru 5 mió krónur játtaðar til tess at gera eina tunnil til Viðareiðis, sigur undrandi tingmaðurin úr Kunoy.

Hann vil tí hava svar uppá, um nakað skal gerast, og ikki minst, nær tað skal gerast.

- Tað hevur skund, tí tað er sera vandamikið at koyra á hesum vegastrekkjunum í dag, vísir hann.

Á tingfundi mikudagin í farnu varð samtykt at hesin fyrispurningurin skal svarast.

So innan rímiliga tíð fæst at vita, hvørjar ætlanir landsins myndugleikar hava lagt um tunnilsarbeiðir í Norðoyggjum.

# Nú skal sjónleikur spælast í Sandvík

**Gongur tað sum tey bæði, Vibeke og Aksel á Botni í Sandvík ætla, so fer sjónleikur at verða spældur í bygdini seinni í ár.**

Snorri Brend

Tey arbeiða nevniliga við at seta upp ein sjónleik í bygdini. Avbjóðingin er nú at finna leikarar til hesa verkætlanina.

Á Suðuroyarportalinum hava tey tí sóknast eftir ungum sjónleikahugaðum fólkum, sum kunnu spæla við í hesum leikinum.

Tey bæði eru ikki ókend við sjónleikir og framførslur av slíkum í heimbygd teirra, Nólsoy. Nú er so ætlanin at spæla einhvønn leik í heyst.

Við sendingina "Góðan morgun, Føroyar" í morgun segði Vibeke, at tey ikki enn hava avgjørt júst hvønn leik tey skulu spæla. Men tey hava fleiri leikir í at velja.

- Tað veldst alt um, hvørjir leikarar ið verða tøkir, sigur Vibeke á Botni.

Sovítt sum hon hevði fingið uppspurt, er sjónleikur ikki spældur í Sandvík seinastu fimmti árini. Men nú er so fyrsta stigið tikið til at at hetta kann gerast veruleiki.

So her er møguleiki hjá sjónleikahugaðum suðuroyingum at skriva søgu, við at spæla sjónleik kanska á fyrsta sinni í Sandvík.

*snorri@sosialurin.fo*